# FORSKÚLIN
## Á ARGJAHAMRI




©NUDLAVIRKID

Forskúlin hevur pláss fyri 48 børnum.

Innskriving í forskúlan verður tá felagsinnskriving er í Reinsarínum mikudagin 18. januar og hósdagin 19. januar. Tað fer tó væntandi eisini at bera til at innskriva næmingar í 1.fl á heimasíðuni hjá kommununi.













Kunnandi fundur um forskúlan komandi skúlaár er týskvøldið 10.januar kl 19.00 í Miðrók.

Foreldragjaldið fyri forskúla saman við gjaldi fyri frítíðarskúla er 1.774,- og er tað sama gjaldið sum fyri barnagarð. Gjaldið fyri forskúlan er 734,- og fyri frítíðarskúlan 1040,-

Starvfólki á forskúlanum eru lærarar og námsfrøðingar.



Børnini vera í forskúla fyrrapartar, og í frítíðarskúla seinnapartar. Skúlatíðin er frá kl. 8.00, men til ber hjá foreldrum at lata børnini í forskúlan frá 7.30.

# FORSKÚLIN
## Á ARGJAHAMRI

Eftir summarfrítíðina byrjar aftur forskúli í skúlanum á Argjahamri. Vit hava nú í trý ár havt eitt spennandi og mennandi forskúlatilboð. Við forskúlanum ber til at fara inn í eina skipaða læri- og spælitilgongd, so børnini kunnu gerast kend við viðurskiftini í einum komandi 1. flokki. Hetta er ein brúgvabygging millum dagstovn og skúla. Fakliga verður bygt oman á teir lunnar, ið lagdir eru í heimi og dagstovni. Leikur og spæl eru týðandi partur í forskúlanum, og læringin tekur støði í spæli. Í forskúlanum verður arbeitt við hesum høvuðsøkjum: Mál og málmenning, náttúru og náttúrufyribrygdum, rørslu og motorikki, sosialum førleikum, samstarvi og handa- og listagávum. Gerandisdagurin í forskúlanum verður skipaður í samstarvi millum pedagogar og lærarar. Virksemið skal stuðla fjølbroyttu menningini hjá tí einstaka barninum. Inni á heimasíðuni hjá skúlanum www.sah.fo ber til at kunna seg nærri um hvørji vit eru.



### HØLIÐSVIÐURSKIFTI

Forskúlin heldur til í grunddeildini (1. - 3.flokkur) í tveimum skúlastovum, ið ætlaðar vóru til for- og frítíðarskúlan, tá bygningurin varð bygdur. Hølisviðurskiftini eru góð við ljósum og kveikjandi umhvørvi. Her eru nógv ymisk rúm, sum leggja upp til ymisk alskyns spøl, kreativitet og menning. Eisini er møguleiki at brúka fimleikahøllina og serhølini. Uttanfyri skúlan er felagsøki til spæl eins og fótbóltsvøllur, har bóltspøl kunnu spælast.

### UM FRÍTÍÐARSKÚLAN Á ARGJAHAMRI

Frítíðarskúlin leggur stóran dent á at frítíðin er tíðin hjá børnunum. Spæl o.a. virksemi er sjálvboðið og skemalagt á øðrvísi hátt enn í skúlanum. Børnini hava sjálvi møguleika at ráða yvir sínum virksemi, tó undir ábyrgd og vegleiðing av starvsfólkunum. Frítíðarskúlin ynskir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag, sum er stuttligur, avbjóðandi, hugnaligur og góður. Børnini hava møguleika at fáa íblástur til ítriv og at vera skapandi. Vit leggja stóran dent á, at menna teir persónligu og sosialu førleikarnar, samstundis sum vit eisini geva tí aktiva barninum ans. Inni á heimasíðuni hjá stovninum **www.argjahamri.fo** ber m.a. til at síggja visiónir, virðisgrundalag, námsætlan og virksemi.